# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*



# Elektriskur vørubilur

Mercedes-Benz Vito E-Cell er heimsins fyrsti hópframleiddi eldrivni vørubilur í sínum klassa.

Á framsýningini Transport 2011 í Herning frá 6.-9. apríl verður nýggi Mercedes-Benz Vito E-Cell, sýndur fram. Hóast tað ikki er nakað nýtt við smáum eldrivnum vørubilum, er hetta fyrstu ferð at ein so stórur heilt elektriskur vørubilur verður hópframleiddur á eini bilverksmiðju.




*Mercedes-Benz Vito E-Cell*




## Bosch 125 ár

Týska Bosch konsernin kann í ár hátíðarhalda, at 125 ár eru liðin síðan Robert Bosch stovnaði fyritøkuna í Stuttgart í 1886.

Bosch er í dag ein leiðandi altjóða leverandørur av teknologi og heimsins størsti veitari til bilaídnaðin. Í ár eru eisini liðin 150 ár liðin síðan Robert Bosch varð føddur í 1861. Robert Bosch andaðist 12. mars 1942, 80 ára gamal. Bosch er í dag umboðað í yvir 60 londum við 283.500 starvsfólkum kring um í heiminum.

## Jarðskjálvtin seinkar framleiðsluni

Ringasti jarðskjálvtn í Japan nakrantíð í Sendai landslutinum við eftirfylgjandi tsunami og vanda fyri radioaktivari geisling, leggur í hesum døgum dempara á alla framleiðslu í landinum.

Vanlukkan rakar bilaídnaðin, sum er ein týðandi inntøkukelda í japanska búskapinum, sera hart.

Flestu bilverksmiðjurnar hava verið stongdar síðan vanlukkuna.

Vanlukkan rakar eisini bilverksmiðjur uttan fyri Japan, ið keypa komponentar frá japanskum undirveitarum. Nógvir av teimum stóru og kendte undirveitarunum til bilaídnaðin halda til í hart rakta jarðskjálvtaøkinum.

**Hósdagin 24. mars kl. 16.10**

Í sendingini verður vitjað í nýggja handlinum "Miðgarð" í Dr. Jakobsensgøtu í Havn. Samrøða er við eigaran Frank Møller, ið selur museumssmúkkur og søguligar lutir, samstundis sum hann framleiðir søguligar møblar.

Eisini verður ein samrøða endursend við Jógvan Ingvard Olsen á Toftum, ið fortelur um fyrstu vegirnar og bilarnar á Toftum. Samrøða er eisini við Oliver Andreasen á Argjum, sum fortelur um síni flottu ellisakfør.



Oliver Andreasen



Jógvan I. Olsen



Frank Møller

Vinnu- & bílradio á Rás 2